FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 25. august 2022
J.nr.: 22/14782-2

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-12/2022 frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um ríkisveiting og fíggjarligt sjálvbjargni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu stórur partur av samlaða almenna búskapinum er ríkisveitingin, t.e. í mun til inntøkur og útreiðslur hjá landi, kommunum og almennum grunnum?
2. Hvussu stórur partur av samlaða almenna búskapinum var ríkisveitingin í 2001?
3. Hvørjar hava inntøkurnar hjá landi, kommunum og almennum grunnum verið hesi árini við og eftir 2001, og hvussu stórur partur av inntøkunum hevur ríkisveitingin verið?
4. Hvørjar hava almennu útreiðslurnar verið hesi somu ár, og hvussu stórur partur av útreiðslunum hevur ríkisveitingin verið?
5. Hvør er føroyska bruttutjóðarúrtøkan í løtuni í mun til ta donsku og onnur grannalond, og hvussu stórur partur av føroyska BTÚ er ríkisveitingin?

Til nr. 1
Nýggjasta tøka uppgerðin yvir samlaða almenna búskapin, tað er land, kommunur og almennar sosialar grunnar, er fyri árið 2020. Talva 1 niðanfyri vísir inntøkur og útreiðslur hjá landi, kommunum og almennum sosialum grunnum í mió. kr. og fyri árið 2020.

TALVA 1 : 2020	*Landið*	*Kommunur*	*Sosialir grunnar*	*Tað almenna tils.*
Inntøkur (mió. kr.)	6.800	3.093	1.376	11.269
Útreiðslur (mió. kr.)	7.515	3.364	1.249	12.128

Kelda: Hagstovan (talva LK01010 í Hagtalsgrunninum).

Ríkisveitingin á 642 mió. kr. var sostatt út við 6% av inntøkunum hjá tí almenna og um 5% av útreiðslunum hjá tí almenna í 2020.

Víst verður eisini til svar uppá fyrispurning nr. 52-134/2020 eftir § 52 a í tingskipanini frá tingárinum 2020/21.

Til nr. 2
Talva 2 niðanfyri vísir inntøkur og útreiðslur hjá landi, kommunum og almennum sosialum grunnum í mió. kr. og fyri árið 2001.

TALVA 2 : 2001	*Landið*	*Kommunur*	*Sosialir grunnar*	*Tað almenna tils.*
Inntøkur (mió. kr.)	4.281	1.241	349	5.871
Útreiðslur (mió. kr.)	3.588	959	239	4.786

Kelda: Hagstovan (talva LK01010 í Hagtalsgrunninum).

Ríkisveitingin var 982 mió. kr. í 2001, og sostatt var hon út við 17% av inntøkunum hjá tí almenna og út við 21% av útreiðslunum hjá tí almenna í 2001.

Víst verður eisini til svar uppá fyrispurning nr. 52-134/2020 eftir § 52 a í tingskipanini frá tingárinum 2020/21.

Til nr. 3 og nr. 4
Í talvu 3 niðanfyri eru vístar inntøkur og útreiðslur hjá landi, kommunum og almennum sosialum grunnum og ríkisveitingin síðani 2001.

TALVA 3	*Inntøkur (mió. kr.)*	*Útreiðslur (mió. kr.)*	*Ríkisveiting (mió. kr.)*	*Ríkisveiting (% av inntøkum)*	*Ríkisveiting (% av útreiðslum)*
2001	5.871	4.786	982	17	21
2002	5.784	5.301	616	11	12
2003	5.695	5.488	616	11	11
2004	5.688	5.880	616	11	11
2005	5.828	5.944	616	11	10
2006	6.459	6.157	616	10	10
2007	6.928	6.627	616	9	9
2008	7.062	7.382	616	9	8
2009	6.659	7.224	616	9	9
2010	6.929	7.370	616	9	8
2011	7.234	7.474	616	9	8
2012	7.332	7.584	624	9	8
2013	7.504	7.875	632	8	8
2014	8.031	8.088	635	8	8
2015	8.604	8.373	642	7	8
2016	9.229	8.848	642	7	7
2017	10.064	9.506	642	6	7
2018	10.630	10.596	642	6	6
2019	11.352	11.115	642	6	6
2020	11.269	12.128	642	6	5

Kelda: Hagstovan (talva LK01010 í Hagtalsgrunninum) og Gjaldstovan (leiðslukunningarskipanin).

Víst verður eisini til svar uppá fyrispurning nr. 52-134/2020 eftir § 52 a í tingskipanini frá tingárinum 2020/21.

Til nr. 5
Nýggjasta uppgerðin av føroysku bruttotjóðarúrtøkini er fyri árið 2020. Tá var bruttotjóðarúrtøkan mett til 21,2 mia. kr. ella 404 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Roknast kann við, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva vaks 4-5 % í 2021.

Bruttotjóðarúrtøkan í Danmark varð uppgjørd til 399 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2020 og 428 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2021 sambært Danmarks Statistik.

Torført er at sammeta føroysku bruttotjóðarúrtøkuna við ta íslendsku, norsku ella svensku, tí tá er neyðugt at rokna um til eitt felags gjaldoyra.

Talva 4 niðanfyri vísir bruttotjóðarúrtøku í USD fyri árini 2020 og 2021 býtt á fýra grannalond sambært uppgerð hjá OECD. At døma útfrá hesum – og um vit siga, at føroyska og danska bruttotjóðarúrtøkan eru á áleið sama stigi fyri hvønn íbúgva – ber helst til at siga, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan er á sama stigi sum í okkara grannalondum, tó við undantaki av Noregi, har bruttotjóðarúrtøkan er nakað hægri.

TALVA 4 : BTÚ fyri hvønn íbúgva í USD	*Danmark*	*Ísland*	*Noreg*	*Svøríki*
2020	60.099	53.381	62.650	55.631
2021	64.877	57.615	79.163	60.150

Kelda: OECD (2022), Gross domestic product (GDP) (indicator). doi: 10.1787/dc2f7aec-en.

Ríkisveitingin á 642 mió. kr. var um 3% av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni á um 21,2 mia. kr. í 2020.

Í sambandi við hendan fyrispurningin er neyðugt at nevna tað fyrivarnið, at danski staturin rindar fleiri útreiðslur í Føroyum, sum ikki eru taldar við í ríkisveitingina, og sum eru útreiðslur, sum sjálvstøðug lond vanliga hava og rinda.

Víst verður eisini til svar uppá fyrispurning nr. 52-134/2020 eftir § 52 a í tingskipanini frá tingárinum 2020/21.

Tinganes, 25. august 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum